# Nógv fólk heim við Norrönu

**Rættiliga fitt av fólki nýta Norrønu, tá tey koma heim á jólum. Áki Jespersen av ferðafólkadeildini hjá Smyril Line sigur, at felagið hevur roynt at hava góð tilboð um jólini**

FERÐING
*Stefan í Skorini*




*Norrøna flytir nógv fólk heim á jólum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Hetta er fjórði veturin at Smyril Line hevur Norrønu í sigling millum Føroyar og Danmark í vetrarhálvuni eisini. Fyrsta árið var hesin nýggi ferðamøguleikin ógvuliga væl umtóktur. Síðani er áhugin minkaður eitt sindur.

Áki Jespersen, leiðari á ferðafólkadeildini á Smyril Line, sigur, at árið í ár hevur verið hampuligt, hvat vetrarsiglingini viðvíkur.

Norrøna hevurført 520 fólk til Føroyar teir tríggjar seinastu túrarnar undan jólum. Harumframt eru 170 bilar førdir inn í landið.

Til Danmarkar eru hinvegin farin 250 fólk. Talið av ferðfólki hvønn túrin um veturin plagar at liggja millum 50 og 100 um veturin, og um høgtíðirnar er tað væl hægri.

Annars er tað mest farmaflutningur, ið Smyril Line satsar uppá í vetrarhálvuni, og nógvur farmur kemur eisini við Norrønu undan jólum.

## Jólatilboð

Áki Jespersen sigur, at felagið hevur roynt at hava góð tilboð við høgum avsláttri nú um høgtíðina. Tað er neyðugt, um felagið skal klára seg í kappingini við flogfeløgini, ið kunnu bjóða ferðafólki eina styttri ferð.

– Vit hava havt eitt gott tilboð, har tvey fólk ferðast fyri prísin hjá einum. Tað kostar slakar 3.000 krónur hjá tveimum fólkum við bili at koma til Føroyar, og tað er bíligt, sigur Áki Jespersen.

Hann sigur, at tey eisini hava havt tilboð til lesandi og pensjónistar umframt bilpakkar. Norrøna kemur á Havnina jólaaftan, og tá er nógv fólk við.

# Meiri tónleikur minni tíðindi

ÚTVARP
*Ingrid Bjarnastein*



*Útvarp Føroya sendi í 1997 5625 tímar út í luftina*

Útvarp Føroya hevur seinastu árini víðkað munandi um talið av sendum tímum. Í árbókini fyri Føroyar 2001 eru tøl frá 1993 til 1997. Hesi árini hevur útvarpið økt um talið av sendum tímum við 1455 tímum. Útvarpið hevði í 1993 4170 sendar tímar, meðan longu í 1997 var talið komið uppá 5625 tímar.

Á tølunum sæst, at sendingarnar, sum koma undir heitið "tónleikur og føroyskur dansur" eiga meginpartin av senditíðini hjá útvarpinum. Av teimum 5625 sendu tímunum í 1997 vóru 49,8% tónleikur og føroyskur dansur. Tað sigur so mikið sum tað, at Útvarp Føroya sendi 2801,25 tímar av tónleiki í 1997. Hetta gevur eitt miðaltal uppá umleið 7,7 tímar um dagin.

Hinvegin so eiga tíðindini ikki so stóran part av útvarpsins dagligdegi. Seinastu árini er hetta eisini minkað munandi. Í 1993 tóku tíðindi 19,5% av útvarpstíðini, meðan í 1997 er talið dottið niður á 14,1%. Tó so. Tilsamans sendi útvarpið 725 tímar av tíðndum, so heilt lítið er tað kortini ikki.

Talið á ítróttarfrásagnum er eisini vaksið síðani 1993. Ítróttarfrásagnirnar eru farnar 150% upp í senditíð. Í 1993 umfataðu ítróttarfrásagnirnar bert 1% av útvarpsins senditíð, men talið er nú komið uppá 2,5%.

Útvarp Føroya hevði eisini fleiri endursendingar á skránni í 1997. Tó skal tá havast í huga, at talið av sendum tímum er vaksið nógv síðani 1993, og tískil eru jú fleiri tímar at endursenda. Grundin til, at nýggjari tøl ikki eru við er, at tey eru ikki tøk enn, sambært árbókini.



# Sjálvstýrið er ríkismál

**Tað er ikki at blanda seg í føroyskan innanlandspolitikk at tosa um sjálvstýri á Fólkatingi, sigur Lars Emil Johansen. Vit tosa um ríkismál í hesum førinum, og mugu tola viðmerkingar frá hvørjum øðrum. Vit liggja ikki í kuvøsu**

SJÁLVSTÝRISMÁL
*Edvard Joensen*



*Lars Emil Johansen fer altíð at taka lut í sjálvstýriskjakinum, ið hann hvørki metir sum grønlendsk ella føroyskt sermál, men ríkismál, sum er líka nógv danskt eisini*

Nú skulu vit ikki vera skjarrligir í Norðurhøvum og ikki tola, at onnur gera viðmerkingar til tað, vit takast við, heldur grønlendski fólkatingsmaðurin, Lars Emil Johansen, sum fer at svara Jóannesi Eidesgaard aftur upp á brævið, hesin sendi honum og Siumut týsdagin.

Lars Emil Johansen sigur, at tað stendur honum frítt sum fólkatingsmaður at meina tað, hann vil, og siga tað í teimum nevndum, hann er limur í. Í hesum førinum er talan um, at hann er limur í Føroyanevndini og hevur boðið sær til at bera tey sjónarmið, føroyski fólkatingslimurin í Norðuratlantssamgonguni hevur hug at fáa fram har. Tað er tað, alt málið snýr seg um, sigur Lars Emil Johansen.

Hann metir ikki, at tað á nakran hátt er at blanda seg í føroyskan politikk, um hann ber sjónarmiðini hjá Tjóðveldisflokkinum fram í eini fólkatingsnevnd.

Sjálvstýrismálini eru ríkismál, metir hann, sum viðkoma líka nógv øllum trimum pørtunum í ríkinum. Hann ætlar sær ikki at orða nakran føroyskan politikk, men bera fram tær orðingar, sum koma úr Føroyum. Tað eiga føroyskir politikarar at tola, sigur Lars Emil Johansen.

Hann heldur, at hvørki føroyingar ella grønlendingar skulu kenna seg sum nakrar heilagar kýr, sum eingin má nerta við ella gera viðmerkingar til.

– Vit liggja tó ikki í kuvøsu, sigur hann, og eiga at tola, at onnur hava eina meining um mál, sum vit kanska hava hug at kanna okkum.

Sjálvur hevur hann einki í móti, um føroyingar hava eina meining um grønlendskan politikk, men hann væntar kortini ikki, at føroyingar fara at vilja seta politisku dagsskránna í Grønlandi. Sama er galdandi í hesum førinum, vísir hann á. Tann, sum hevur skilt orð hansara í Útvarpinum sum íblanding í føroysk viðurskifti, hevur misskilt tey, leggur grønlendski fólkatingsmaðurin dent á.

– Eingin kann forða mær at hava míni egnu sjónarmið. Eg eri í móti sensuri, og eg ætli mær at siga tað, eg haldi meg hava rætt til. Tað er bara grønlendska veljaranum, sum hevur givið mær fulltrú at tala á Fólkatingi, eg standi til svars fyri, staðfestir Lars Emil Johansen.

# Avtalan komin undir land

**Væntandi fara somu bussførarar, sum higartil, at koyra hjá Bygdaleiðum í Suðuroy komandi árið. Semja um treytirnar er at kalla klár**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Poul Johannes Poulsen, bussførari, fegnast um batarnar í avtaluni*

Bussførararnir í Suðuroy fáa 12,5 prosent í lønarhækkan, umframt onkrar aðrar smávegis ábøtur. Koyringin skal halda fram eitt ár afturat, eins og summir bussar verða skiftir út við nýggjari.

– Tað er í høvuðsheitunum tað, vit eru komnir til, sigur Poul Johannes Poulsen, bussførari í Sumba.

Tá Sosialurin tosaði við hann, var semjan ikki undirskrivað, tí okkurt heilt smávegis var eftir at avgreiða. Tó ikki so, at semjan ikki fór at verða til nakað kortini, væntaði hann.

Poul Johannes Poulsen sigur, at teir eru nøgdir við tað, sum komið er burturúr. Sáttmálin, koyrt fer at verða eftir, er í høvuðsheitum tann sami sum tann, ið galdandi er í løtuni. Tó við ávísum broytingum sum eitt nú teimum 12,5 prosentunum.

Tað verða í fyrstu syftu eigararnir sjálvir, sum í mesta mun fara at koyra, sigur hann. Tað kemst av, at fleiri av hjálparfólkunum, teir hava havt aftur at sær, eru farin í annað starv, nú so leingi sá út til, at koyringin fór á aðrar hendur.

Flestu bussarnir í Suðuroy eru so gamlir, at neyðugt er at skifta teir út. Tað fer so at verða gjørt við bussum, sum Strandfaraskip Landsins fara at taka inn frá øðrum, sum gevast at koyra. Hesir bussarnir fara so at hækka tænastustøðið nakað væl, metir Poul Johannes Poulsen.

Hann sigur annars, at Suðuroyggin er nakað fyri seg, tá talan er um bussferðslu. Tað ber ikki til at nýta somu bussarnar allastaðni í oynni. Eitt nú má bussurin, sum skal til Hvalbiar og Sandvíkar ikki vera ov stórur, fyri at sleppa í gjøgnum tunnilin.

Tað eydnaðist ikki beint áðrenn blaðið fór til prentingar at fáa váttað frá Strandferðsluni ella bussførarunum, um endaliga avtalan var undirskrivað.


